# Hei-Mai ein spennandi handil í Klaksvík



Seymistovan og handilin, Hei-Mai í Klaksvík, verður við á bústevnuni Hús og Innbúgv í Runavík. - Vit leggja okkum eftir at hava alt tað nýggjasta og fiksasta, bæði innan meturvørur og snið, sigur Heidi Høgnesen

**Seymistovan, Hei-Mai í Klaksvík, er ein av framsýnarunum á bústevnuni Hús og Innbúgv í Runavík. Handilin, sum leggur seg eftir at hava tað nýggjasta og fiksasta innan gardintoy, hevur nógvar aðrar handgjørdar lutir við á framsýningini.**
**- Vit ætla at gera fyritøku okkara kenda um alt landið, sigur Heidi Høgnesen, sum eigur og rekur seymistovuna**



*Heidi ætlar at gera handil sín kendan um alt landið. Seymistovan hevur alt tað nýggjasta í meturvørum, og bjóðar seg fram at vegleiða virkjum og fyritøkum í vali av gardinum og sniði*

GARDINUR OG SEYMING
*Orð og myndir: Rúna Sivertsen*

Ynskir tú gardinur ella aðrar seymaðar lutir, sum ikki øll hini hava av sama slagi, far so til Klaksvíkar, út í Klaksvíksgarðin til Hei-Mei og leita. Handilin er á tremur við toyið av smartasta slag. Umframt seymaðar gardinur, dúkar og seingjarklæði, eru eisini hópin av handgjørdum gávulutum á hillunum.

- Aftrat gardinum, seingjarklæðum og dúkum, seyma vit eisini barna- og vónarklæðir, sigur Heidi.

### Fjøltáttað seymistova

- Gardinur er okkara servøra, men vit seyma eisini alt møguligt annað, t.d. seingjarklæði, dúkar, pútur, fyriklæði, tehettur og grýtulappar, sigur Heidi.

Hon sigur, at mótin við barnaklæðum seinastu árini hevur gjørt tað neyðugt at seyma til summi børn. Barnamótin hevur verið illa egnaður til tey børn, sum vit vanliga rópa buttut. Tey børnini hava ein trupulleika, sum vit kunnu loysa, so tey eisini kunnu ganga smart ílatin.

- Eisini seyma vit klæðir til barnakonur og kvinnur, sum ikki finna nakað, teimum dámar í handlunum, sigur Heidi.

### Virkir og fyritøkur

Aftrat sær at seyma hevur Heidi tvær kvinnur, sum arbeiða hálva tíð. Seymistovan seymar eisini fyri virkir og fyritøkur, og ráðgevur teimum í vali av toyi og sniði.

Hei-Mai hevur havt opið í smá trý ár. Tær vóru tvær, sum byrjaðu, men nú hevur Heidi yvirtikið partin hjá hinari.

- Hetta er strævið, men ógvuliga stuttligt, sigur Heidi, sum sær ljóst uppá framtíðina, og ætlar sær at satsa uppá viðskiftafólk um alt landið.

Heidi og tær hava seinastu vikurnar seymað ein hóp niðrufyri at hava við á bústevnuna.

Vitja Hús og Innbúgv í Runavík, og hygg inn á spennandi básin hjá Hei-Mai í Klaksvík.

# Ymisk tiltøk verða stevnudagarnar



*Í Gamla Handlinum hjá Pidda fara kvinnurnar, Ketty á Fríðriksmørk og Dagmar Beder, at sýna fram list, meðan bústevna er í Ítróttarhøllini.*

*Mynd: Ian D. Jacobsen*



*Í Bygdasavninum Forna verður framsýning við ymiskum fornlutum og gomlum myndum av fiskaarbeiði, bæði á sjógvi og landi.*

*Mynd: Ian D. Jacobsen*

**Handlarnir verða longri opnir, framsýning av myndum og lutum verður í Forna, og listaframsýning verður í Gamla Handli hjá Pidda**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*

Í samband við bústevnuna, Hús & Innbúgv, verða ymisk tiltøk í Runavíkar kommunu komandi vikuskiftið.

Handlarnir, sum eru við í handilsmiðdeplinum, fara at hava langan leygardag. Allir lata ikki upp samstundis, men opið verður leygardagin til kl. 17.

### Bygdasavnið

Í Bygdasavninum, Forna á Glyvrum, er ein serlig framsýning sett upp, sum lýsir fiskaarbeiði, bæði á sjógvi og landi.

Í Forna eru eisini ymiskir fornlutir at síggja, eitt nú innbúgv, brúkslutir, amboð og mangt annað, sum hoyrir gomlu tíðini til.

Bygdasavnið verður opið leygardagin og sunnudagin frá kl. 16.00-20.00.

### Listaframsýning

Ein áhugaverd listaframsýning verður eisini í Runavíkar kommunu, meðan bústevnan er.

Karmur um hesa framsýning verður Gamli Handilin hjá Pidda, sum liggur niðri á havnalagnum, har sluppin, Høganes, eisini liggur.

Tað verða tvær kvinnur, sum fara at sýna fram málningar. Ketty á Fríðriksmørk, sum júst hevur havt listaframsýning í Føroya Banka á Strondum, er onnur. Hin er Dagmar Beder, sum býr á Kambsdali.

Framsýningin í handlinum hjá Pidda verður opin fríggjadagin, klokkan 18.00-20.00 og leygardagin og sunnudagin, klokkan 16.00-20.00.



# – Vit eru tráðleyst við á Hús & Innbúgv

**Gleðing var kanska tann mest "modernaði" samskiftishátturin í gomlum døgum – óbeinleiðis og tráðleysur...**
**- Nú fer samskiftisfyritøkan, Teletech, aftur á slóðina hjá okkara forfedrum, men við fremstu tøknini, sum er á økinum, sigur Birgir W. Høgnesen, sølumaður**

TELETECH
*Vilmund Jacobsen*

Internetveitarin, Teletech, verður umboðaður av teldufyritøkuni, Tera í Saltangará, á bústevnuni, Hús & Innbúgv.

- Lívið alt er samskifti, úr vøggu í grøv. Í flestu lívsins viðurskiftum ræður um, at boðini koma fram rættstundis, óbroytt og til rætta viðkomandi.

Hetta vita tey á Teletech, og tí leggur internetveitarin seg eftir at veita tænastur, ið kunnu nøkta tørvin í einum framkomnum samfelag.

- Mesta samskifti hjá flestum okkara er beinleiðis sambandið, sum er millum fólk. Men samskifti kann eisini vera óbeinleiðis, og tá brúka vit viðhvørt røddina, t.d. telefonina – og onkuntíð brúka vit ikki røddina. Í øllum førum mugu vit hava einhvønn miðil at flyta boðskapin fram til móttakaran við.

### Aftur á slóðina...

Birgir W. Høgnesen, sølumaður hjá Teletech, vísir á, at eins og aðrar mentanir, so hava eisini føroyingar í øldir havt tørv á fjarskifti.

- Forfedrar okkara góvu boð frá sær, tá ið grindaboð vóru, og tá ið eitt nú prestur, lækni ella jarðarmóðir skuldu koma. Teir gingu ella róðu bygdanna millum, teir róptu um sund og fjørð, teir brendu vita, og teir glaðaðu. Seinni kom telegrafurin, telefonin og boðstøðirnar. Í øllum førum var hetta sama galdandi; boðini skuldu koma fram til rætta viðkomandi, skjótt og óbroytt.




*Teletech er einasta fyritøka í Føroyum, sum bjóðar viðskiftafólki sjálvstøðugt, tráðleyst internetsamband.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



*- Samskiftisferðin er nógv – og hon verður størri enn. Veksandi tørvurin á skjótum samskifti hevur við sær, at vit í næstum fara at fleirfalda samskiftisferðina, sigur Birgir W. Høgnesen*

Birgir heldur, at vit kanska kunnu siga, at glaðingin var tann mest "modernaði" samskiftishátturin í gomlum døgum – óbeinleiðis og tráðleysur...

- Og nú fer Teletech so aftur á slóðina hjá okkara forfedrum, men við fremstu tøknini, sum er á økinum.

Sølumaðurin vísir á, at Teletech er einasta fyritøka í Føroyum, sum bjóðar viðskiftafólki sjálvstøðugt, tráðleyst internetsamband.

- Og tað virkar, sigur hann.

Í fjør virkaði netið hjá Teletech í 362 dagar uttan brek, og fyritøkan hevur battarí orku til allar servarar seks tímar eftir streymslit.

- Samskiftisferðin er nógv, 3 Mbit útgerð. Men tað verður betur enn, tí veksandi tørvurin á skjótum samskifti hevur við sær, at Teletech í næstum fer at fleirfalda samskiftisferðina við 10-20 Mbit útgerð, sigur Birgir.

### Nøgd viðskiftafólk

Sølumaðurin leggur dent á, at tað eru ikki bara tey, ið starvast hjá Teletech, sum halda, at tey kunnu bjóða eina fjarskiftistænastu, ið ger tað møguligt hjá viðskiftafólki at samskifta, so boðini koma skjótt, óbroytt og til rætta viðkomandi.

- Vit hava í dag fleiri enn 100 vælnøgd viðskiftafólk. Av hesum eru nøkur privatviðskiftafólk, men flestu eru virkir. Helst verða virkini uppaftur fleiri, tí nýggja samskiftisferðin er væl egnað til innanhýsis dátusamskifti millum høvuðssetur, deildir og hús hjá sama eigara – uttan at gjalda fyri tað!

Tey á Teletech siga, at tey ikki selja nakra lágprísvøru, men at trygd, dygd og effektivitetur er málsetningurin.

- Vit eru nøkur fólk í fulltíðarstarvi, umframt fleiri uttanhýsis tænastuveitarar til seruppgávur. Øll eru til dystin fús at greiða frá teimum tænastum, vit veita, sigur Birgir W. Høgnesen, sølumaður.

### Tráðleyst prát...

Fólk eru vælkomin at venda sær til sølumannin á tlf. 221577 ella at støkka inn á gólvið - til eitt tráðleyst prát og ein kaffimunn.

Í dag røkkur TeleTech viðskiftafólki í Klaksvík, Leirvík, Gøtunum, Skálafirði, Strondum, Toftum, Nólsoy, Tórshavn og á Argjum.

TeleTech hevur tlf. 317265. Tú kanst eisini senda ein e-post til birgir@teletech.fo. Heimasíðan eitur www.teletech.fo

Tað verður, sum nevnt, teldufyritøkan, Tera í Saltangará, sum kemur at vísa tráðleysa internetið hjá Teletech fram á bústevnuni.

Tera hevur tlf. 448888 ella 2 18889.

www.bustevnan.fo